# Sera stuttligt at vera í praktikk







**Í síðstu viku og hesa vikuna eru næmingar í 9. flokkum í Havn í praktikk. Eftirsum vit sjálvar eru praktikantar á Sosialinum, hava vit valt at tosa við fýra praktikantar úr Venjingarskúlanum, sum eru á rættiliga ymiskum praktikkplássum**

STARVSVENJING

*Guðrun Jacobsen og Annika Isfeldt*

– Mær dámar sera væl at vera í praktikk í »Yndi Fitness«! Vit eru tríggjar úr 9. flokki, sum eru í praktikk her. Vit sleppa at brúka allar maskinurnar, sum eru her, sigur Ruth Apol Mortensen um hennara praktikkpláss.

– Vit tríggjar hava tað ordiliga stuttligt saman. Eisini tá vit vaska, hava vit tað skeg. Hósdagin var ein venjari fráverandi, og vit sluppu so at taka ballettímarnir hjá honum. Ein dagin sleppa vit at hava onkran við og læra hann at brúka maskinurnar.

Eg haldi, at tað koma millum 100 og 150 fólk hvønn dag, og tað er avgjørt eitt gott stað at koma, um tú vilt tapa teg, ella um tú vilt hava styrkitrening.

Eg hevði væl tímað at arbeitt í »Yndi«, meðan eg gangi í skúla, og havt tað sum eitt síðustarv, men eg hevði nokk ikki viljað arbeitt her altíð...

Um praktikkplássið hjá sær í SVF sigur Tórður Jacobæus:

– Eg eri saman við kameramonnunum og eri við til at filma, tað er super! Man møtir nógvum nýggjum fólki, og man prøvar nakað nýtt og øðrvísi. Hetta var grundin til, at eg valdi tað.

Eg havi verið í ljóðrúminum, til eitt politiskt kjak, og eg havi verið við til at gjørt »Gekkin« og »Dag og viku«. Eisini havi eg verið á Eiði til eina samrøðu við ein skipara til »Dag og viku«.

Hesa vikuna eri eg í Mentanardeildini, har hin praktikanturin var í síðstu viku.

Eg havi lært nógv av at verið her: hvussu alt gongur fyri seg, og tað er nógv meiri arbeiði í tí, enn eg helt. Tað tekur langa tíð at filma, og man bíðar nógv eftir journalistunum. Tað hevur verið sera áhugavert at roynt, og eg hevði gjarna viljað arbeitt antin sum fotografur í sjónvarpinum, sum programmleiðari ella ljóðmaður.

Leivur Samuelsen, sum er í praktikk í skutarahandlinum »AD-IMPORT« fortelur:

– Her er sera stuttligt at vera! Her er sum oftast nógv at gera, og er tað gott veður, koma sera nógv fólk inn á gólv.

Eg valdi hetta praktikkplássið fyrst og fremst, tí at eg eri áhugaður í skutarum, men eisini tí at eg kenni mannin, sum arbeiðir her. Um dagin eri eg í handlinum frá 10-17, og um kvøldið eri eg til arbeiðis á verkstaðnum. Tað er ætlanin, at verkstaðið skal vera uppi yvir handlinum, har tey eru við at gera klárt til hetta, men í løtuni, liggur tað nær við Eysturskúlan.

Tað er øgiliga ymiskt, hvussu langar arbeiðstíðinar eru á verkstaðnum, og eg haldi, at eg havi lært sera nógv her um, hvussu tingini skulu viðfarast. Tí á verkstaðnum umvæla vit skutarar og motorsúkklir. Og tað kundi jú hent seg, at man vildi havt hetta sum framtíðarstarv...



– Týsdagin í farnu viku vóru vit og svumu við tveimum dreingjum úr vøggustovuni. Hetta gera tey eina ferð um vikuna í »Býlingshúsinum undir Fjalli«, har eg eri í praktikk, sigur Valborg Joensen..

– Tað er ordiliga stuttligt at vera saman við teimum lítlu børnunum, og eg sleppi at gera alt tað sama sum tey vaksnu... uttan at skifta blæðu. Í vøggustovuni eru 12 børn, sum øll eru sera fitt.

Eg havi lært, hvussu man ansar eftir børnum, og hvussu man tosar við tey.

Eg hevði kanska viljað arbeitt her eina tíð, men eg hevði nokk eisini viljað roynt okkurt annað.

Og hvat halda vit sjálvar um at vera í praktikk á Sosialinum?

– Tað er ordiliga stuttligt og spennandi at vera í praktikk her. Øll eru sera fitt og hjálpsom, og vit sleppa at gera ordiliga nógv. Vit hava verið við til samrøður og hava eisini sjálvar skrivað nakrar greinar. Vit eru báðar áhugaðar í at skriva og umhugsa báðar eina útbúgving sum journalistur. Eftir at vit hava sæð, hvussu journalistar arbeiða, eru vit bert blivnar uppaftur meir áhugaðar í hesum faki, tí ongin dagur er líka á Sosialinum.




